# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Dagarnir mugu teljast betri

Í morgin fer Løgtingið undir viðgerðina av uppskotinum um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap. Tað snýr seg um talið á fiskidøgum fyri komandi fiskiár, sum gongur frá 1. september og til 31. august 2008.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur skotið upp, at talið av fiskidøgum verður skert. Skerjingin er ikki so stór, sum fiskivinnuserfrøðin hevur skotið upp. Men talan er undir øllum umstøðum um eina skerjing. Soleiðis hevur tað ikki altíð verið, hóast serfrøðin hevur stuðlað upp undir skerjingar. At uppskotið hesa ferð ber á skerjingarborðið ber boð um, at eitt nú toskastovnurin ikki hevur tað so gott, sum hann onkuntíð hevur havt tað.

Lógin um vinnuligan fiskiskap og fiskidagarnar er á hvørjum ári eitt av fremstu málunum, sum verða viðgjørd á hásumri. Talan er um góða fólkaræðisliga gongd, har altjóða serfrøðin, føroyska serfrøðin og ikki minst vinnan gevur sítt íkast, áðrenn landsstýrismaðurin sum útinnandi myndugleikin ger sítt tilmæli, sum hann so hevur lagt fyri lóggevandi myndugleikan at taka støðu til.

At siga, at tað er Løgtingið, sum reelt tekur støðu, er ikki heilt rætt. Løgtingið eigur at samtykkja málið og fer formelt at samtykkja málið. Men reelt hava samgonguumboðini í vinnunevndini saman við landsstýrismanninum gjørt av, hvussu uppskotið skuldi síggja út, sum er lagt fyri tingið, og sum ivaleyst uttan stórar broytingar verður samtykt eftir viðgerð í vinnunevndini.

Prinsipielt var fiskidagaskipanin genial. Í staðin fyri kvotur og útblaking er tað veiðutrýstið, sum skal regulerast.

Reelt treingir fiskidagaskipanin at verða kannað og uppsjeinað. Sum tað fleiri ferðir er komið fram seinastu vikurnar, so er virðið í skipanini ikki stórt, um tað ikki verður kannað, hvussu tað stendur til við veiðutrýstinum og harvið, um virðið í einstaka fiskidegnum í einstaka bólkinum er tað sama, sum tað hevur verið. Um hesin spurningurin ikki støðugt verður kannaður, og um skipanin ikki verður dagførd út frá úrslitunum í kanningunum, so er ikki tann dugur í skipanini, sum tað upprunaliga var, og sum vit so fegin vilja hava, at tað skal vera.

Hetta eigur at vera ein av aðalspurningunum, sum ábyrgdarfullir politikarar eiga at viðgera í morgin. At tosa um at tað ikki skal fiskast á føroysku grunnunum í fleiri ár, er sjálvandi heilt burturvið. Men tann tankin er ivaleyst ein provokatión, tí myndugleikin ikki altíð hevur tikið dagføringina av lógini, sum treingir til, í nóg stórum álvara.

Tað snýr seg ikki minst um at finna fram til, hvat liggur í einstaka degnum, áðrenn farið verður undir at telja og áseta dagarnar.

**Sosialurin**

## Tjóðveldið hjá Annitu !

**Portalurin endurgevur Annitu á Fríðriksmørk fyri at biðja Løgtingið "droppa Sandoyartunnil"**

EYÐUN MOHR VIDERØ



Høvuðsgrundgevingarnar eru, hvussu stórar upphæddir eru nýttar til farleiðina, so sum vegur, ferjulega og nýggj ferja.

Tosað verður, eins og øll henda íløga er burturspilt, um undirsjóartunnili verður gjørdur, men í hesum sambandi er vert at minna tjóðveldiskvinnuna á, at tað einasta veruliga tap, ið møguliga kann ásannast, verður munurin millum byggikostnaðin av Teistanum, og so tað hann kann seljast fyri!

Vegurin millum Gomlurætt og Havnina verður framvegis nýttur. Gamlarætt gerst gott og nýtulig havn hjá útróðrarbátum úr Havn og grannalagnum og møguleikum fyri ferjulegu til tíðir, men hetta hevur tíverri ongan áhuga hjá løgtingskvinnuni, ið bert hevur áhuga fyri støðuni hjá fastløntum tænastu- og starvsfólkum, ið ikki hava brúk fyri undirsjóartunnli ella fyri havn til útróðrarbátar.

Hvat hevur hesin undirsjóartunnil so at týða fyri Sandoynna?

Tjóðveldiskvinnan metir ein undirsjóartunnil bert hava til endamáls at tryggja sandoyingum atgongd til fríðtíðartilboð, ið Havnin kann bjóða, og síðan heimaftur at sova!

Røkkur endamálið ikki longur, so hevur hon rætt. Men her er løgtingslimurin ikki tilvitandi um tørvin hjá einum fólki, ið vil arbeiða og yvirliva, men ikki hevur sína trygd í almennum kassa!

Løgtingslimurin eigur at hava varhuga av, hvussu samfelagið vinnuliga er broytt, at neyv sambinding av øllum landinum skapar neyðugu fyritreytirnar fyri at yvirliva.

Royn og hygg eftir, hvussu stóran týdning tunnilin til Vágarnar hevur, eins og tunnilin til Norðoyggjar.

Hatta er ikki hóskandi boðskapur frá einum politikkara, ið vil mæla okkum til at gerast sjálvstøðugir, tí hennara politikkur vil føra til, at partar av landinum liggja eftir á, og á hennara grundarlagi kann ongin rætthugsandi mæla til tjóðveldi, so her má leggjast á annan bógv!

Okkara áheitan er, at løgtingið samtykkir at fara undir undirsjóartunnil til Sandoynna ongantíð ov skjótt, tí sum umstøðurnar nú laga seg, so er hetta seinasta útkall hjá Sandoynni!

## Minkið Blokkin og takið ferðina av búskapinum

HEÐIN D. POULSEN



Nú er møguleikin at gera føroyska búskapin minni bundnan av donskum lummapengum, nú eiga vit at skera blokkstuðulin munandi. Við landsstýrismanninum hjá Sambandsflokkinum á odda eru nú fleiri ráðandi politikarar vaknaðir og tora at viðurkenna, at búskapurin er glóðheitur. Truplari hava teir við at vísa ábyrgd og leggja summar íløgur í ís.

Sjálvt um Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum nú hevur bakkað, er Magni Laksafoss sum búskaparfrøðingur sannførdur um, at um ferðin á búskapinum ikki verður tikin av, so gongur tað galið. Við hesum í huga átti hann at mælt til, at blokkurin verður skerdur munandi.

At minka blokkin tænir fleiri endamálum: Búskaparligt sjálvbjargni, ferðin á búskapinum minkar, og tað noyðir ábyrgdarleysar politikarar at minka um landskassans útreiðslur. Tíðirnar kundu ikki verið meira hóskandi at tikið av møguleikanum og minka blokkin.

At minka blokkin átti eisini at verið eitt hjartamál hjá Fólkaflokkurin. Á síðsta limafundi har undirritaði luttók, lovaðu allir teir fremstu í flokkinum, at blokkurin fór við vissu at verða skerdur meira enn bert tí hann ikki verður prístalsviðgjørdur. Tað kann tó viðmerkjast, at hetta hava teir í Fólkaflokkinum lovað við hvørt gylt høvi í longri tíð.

Javnaðurflokkurin ger sum Fólkaflokkurin sigur, so har skuldi ikki verið nakar trupulleiki.

Búskapurin er glóðheitur + vit skulu gerast sjálvbjargnari = MINKIÐ BLOKKIN

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.